## Valfeløgini stuðla Kaj Leo

**Vit spurdu um viðmerkingar til formansvalið frá valfeløgum Sambandsfloksins í Norðoyggjum, Eysturoynni og Suðurstreymi, og í øllum førum hava tvey av feløgunum longu avgjørt at stuðla Kaj Leo Johannesen**

FORMANSVAL
*Heini í Skorini*
*heini@sosialurin.fo*

**John William Joensen, Norðoya Sambandsfelag:**
– Á aðalfundi fríggjakvøldið atkvøddu 90 prosent av fundarfólkinum fyri Kaj Leo Johannesen at gerast nýggjur formaður, og tískil stuðla vit honum, men vit fara aftur á fund at viðgerða málið, áðrenn vit fara til Havnar. Flokkurin hevur brúk fyri einum savnandi manni, og hóast onnur góð evni eru, stuðla vit Kaj Leo. Men vit skjóta so ongan upp enn og eru fyribils í bíðistøðu, áðrenn vit aftur fara at fundast.

**Annfinn Brekkstein, Føroya Væl (Suðurstreymoya Sambandsfelag):**
– Eg havi hoyrt meg fyri í hinum valfeløgunum og øðrum grundstuðlum floksins, og vit stuðla Kaj Leo Johannesen at gerast nýggjur formaður floksins. Hann er ungur, men hevur tó neyðugu royndirnar í politikki, og eftir okkara tykki er hann best egnaður at leiða flokkin víðari.

**Johan Petersen, Samhald (Eysturoyar Sambandsfelag):**
– Vit hava als ikki viðgjørt støðuna, og vit fara at fundast í næstum. Vit ætla okkum ikki at hugsa lokalt og partú krevja formann úr Eysturoynni, tí nýggjur formaður skal jú veljast fyri allan Sambandsflokkin kring alt landið. Men enn er so eingin avgerð tikin.

Formansvalið nærkast:

# Kaj Leo er besta boðið

**– Eg havi fingið áheitanir og stuðul ymsastaðni frá at gerast nýggjur formaður Sambandsfloksins, og stendur stuðulin við frá tingbólki og valfeløgum, stilli eg upp til formansvalið, sigur tingmaður Sambandsfloksins, Kaj Leo Johannesen, sum í løtuni tykist vera besta boðið at gerast nýggjur leiðari í kreppurakta Sambandsflokkinum**

FORMANSVAL
*Heini í Skorini*
*heini@sosialurin.fo*

Eftir at fyrst Suðuroy og síðani Norðoyggjar saman við Norðstreymoy hava umboðað Sambandsflokkin í Tinganesi stutta valskeiðið, hava stóru valdømini í Suðurstreymoy og Eysturoynni staðið eftir uttan nakra umboðan í landsstýrinum. Atfinnandi røddir hava frá byrjan verið frammi um, at stóru valdømini hava verið við sviðusoð, og at talan beinleiðis hevur verið um taktiskt mistak ikki at profilera Sambandsflokkin í størru valdømunum, tá landsstýrismenn Sambandsfloksins eru settir.

Júst hetta kann vera ein ábending um, at nú er túrurin loksins komin til Suðurstreymoy, tá nýggjur formaður skal veljast á landsfundi Sambandsfloksins 26-27. mars í læraraskúlahøllini í Havn.



*- Tað er eftir mínum tykki best fyri flokkin, um formaðurin kemur úr Suðurstreymoy, og stendur persónligi stuðulin við, eri eg evni at gerast nýggjur formaður í Sambandsflokkinum, men eg fari fyri floksins skuld ikki út í nakað stríðsval, sigur Kaj Leo Johannesen, nú nýggjur sambandsformaður skal veljast á landsfundi 26-27. mars*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

### Kaj Leo stillar upp

Eitt av mest upplagdu evnunum til nýggjan formann er tingmaðurin Kaj Leo Johannesen úr Suðurstreymoy, og hann dylir ikki fyri, at hann av álvara umhugsar støðuna og væntandi stillar upp á landsfundi Sambandsfloksins um ein góðan mánaða.

– Tað er klárt, at tá størsta valdømið í landinum við so nógvum atkvøðum at fara eftir ikki umboðar nakran »stóran« sess, er tað óheppið fyri flokkin, og tískil meti eg tað vera best fyri Sambandsflokkin, um formaðurin kemur úr Suðurstreymoy, sigur Kaj Leo Johannesen. Kaj Leo leggur afturat, at hann umhugsar sera positivt at gerast formansvalevni.

– Eg havi spurt meg fyri bæði í tingbólki og í valfeløgum, og havi eg fingið áheitanir og stuðul at stilla upp. Stendur stuðulin við, er tískil ógvuliga sannlíkt, at eg gerist kandidatur til formanssessin, sigur Kaj Leo Johannesen.

### Ikki út í stríðsval

Tingmaðurin leggur tó eina við, at hann ikki ætlar sær út í nakað stríðsval, um nógvir fara eftir heita formanssessinum í umstrídda flokkinum.

– Fyri Sambandsfloksins skuld fari eg ikki út í eitt valstríð móti fleiri øðrum uppstillarum, tí tað tolir flokkurin stutt sagt ikki eftir alt tað, sum júst er farið fram. Tað ynskiligasta er altíð, at flokkurin megnar at standa saman um ein, og hetta hevði verið tað besta fyri flokkin, sigur Kaj Leo Johannesen. Sum hann hevur skilt á lagnum, umhugsa nøkur valfeløg at stuðla honum, men enn er ov tíðliga at siga, um flokkurin fer at standa saman um ein, ella um fleiri onnur valevni vera.

– Men havi eg stuðul frá valfeløgum og tingbólki, eri eg eitt evni at gerast nýggjur formaður í Sambandsflokkinum, slær Kaj Leo Johannesen fast. Hann veit í løtuni ikki um nakran annan, sum hevur ætlanir um at stilla upp.

– Eg havi ikki hoyrt um nakran, men sjálvandi stendur einum og hvørjum frítt í boði at stilla upp. Tað besta er tó, um semja kann fáast um ein, og um nógvir stilla upp uttan konsensus í tingbólkinum, seti eg ikki mína undirskrift undir, sigur Kaj Leo Johannesen.

### Samdir um Bjørn Kalsø

Kaj Leo Johannesen leggur dent á, at umboðini úr Suðurstreymoy als ikki vóru misnøgd við valið mánakvøldið at seta Bjørn Kalsø úr Norðoyggjum at vera nýggjur landsstýrismaður við fiskivinnumálum.

– Ein samdur Sambandsflokkur tók avgerðina, og eftir mínum tykki er tað klókt at lata Norðoyggjar fáa eitt umboð eftir framgongdina har, sigur Kaj Leo Johannesen. Hann avsannar, at tingmanningin úr Suðurstreymoy var misnøgd við avgerðina, men nú er sambært honum hóskandi, at landsins størsta valdømi fær formanssessin.

– Sum áður nevnt er eftir mínum tykki best fyri flokkin, um formaðurin kemur úr Suðurstreymoy, og havi eg persónligan stuðul til tað tíð, eri eg evni at gerast nýggjur formaður í Sambandsflokkinum, sigur Kaj Leo Johannesen at enda.

Hóast einki er avgjørt, tykist hann sostatt vera besta boðið uppá mannin, sum skal leiða landsins størsta flokk úr svárari kreppu eftir afturgongd á valinum og eina miseydnaða byrjan í nýggju samgonguni.



# Tingfólk arbeiða uttan løn

**Seks tingfólk arbeiða uttan løn. Fyrsta lønin tey fáa, er lønin fyri mars mánað, hóast tey vórðu vald á ting 20. januar**

TINGMANNALØN
*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*

At tað eru fleiri, sum halda tað verða spennandi at gerast løgtingsmaður, hava vit í valstríðnum farna sæð nógv dømi um. Men at tað skal vera so stuttligt, at fólk siga borgarliga starvið frá sær – og arbeiða sum tingfólk uttan at fáa løn, tað høvdu vit kanska ikki roknað við. Men soleiðis er tað.

Tey, sum fyrstu ferð vórðu vald á ting á valinum 20. januar, hava ikki fingið løn enn. Og tey hava tey heldur ikki rætt til. Hóast tey arbeiða sum tingfólk allan februarmánað, so fáa tey onga løn, tí tey hava ikki rætt til løn fyrr enn 1. mars.

Orsøkin er tann einfalda, at lógin um »samsýning og eftirløn løgtingsmanna« sigur, at løgtingsmaður fær løn »frá 1. degi í mánaðinum aftaná, at løgtingið hevur góðkent valbrævið hjá viðkomandi løgtingsmanni«.

Løgtingsvalið var 20. januar. Fyrsti tingfundur var 3. februar, og tá vórðu valbrøvini góðkend. Nýggju tingfólkini hava tískil ikki rætt til løn fyrr enn 1. mars. Sostatt hava tey arbeitt uttan løn í februarmánaði. Ein teirra, ið ikki fær løn, og sum hevur verið noyddur at siga borgarliga starvið frá sær, er Johan Johannessen, nývaldur tingmaður í Havn. Hann starvaðist sum tíðindamaður í Sjónvarpi Føroya. Men tá hann gjørdi av at stilla upp, fór hann alt fyri eitt í farloyvi. Hann hevði nakað av feriu tilgóðar, og fekk fulla løn í desember. Men bert triðingsløn í januar.

– Ja, eg má so staðfesta, at eg higartil í ár bert havi tjent einar 8.000 kr – í sjónvarpinum. Og eg fái onga løn í februar – ikki fyrr enn 1. mars, sigur Johan Johannesen.



*John Johannessen, løgtingsmaður Javnaðarfloksins í Havn, hevur higartil í ár bert tjent 8.000 krónur, tí hann mátti siga borgarliga starvið í sjónvarpinum frá sær. Fyrsta lønin úr løgtinginum verður marslønin, hóast hann varð valdur á ting 20. januar. Hann fær 30.264 krónur og 73 oyru í løn úr løgtinginum pluss eitt skattafrítt ískoyti upp á 2.000 krónur*

Hóast hetta kann tykjast løgið, so vísir John Johannessen á, at tað var nakað serligt hesaferð, tí tað fall soleiðis út, at valbrøvini vóru góðkent fyrst í mánaðinum, 3. februar. Hevði tingfundur t.d. verið 31. januar, so fingu tingfólkini løn fyri februar.

– Men vit fáa tað so aftur í hinum endanum, um valið aftur verður síðst í mánaðinum og um valbrøvini hjá komandi tinginum ikki verða góðkent fyri eftir mánaðarskiftið eftir, sigur John Johannessen.

Spurdur um hann heldur hetta vera órættvíst, og um hann ætlar at leggja uppskot fyri tingið um at broyta reglurnar, svarar hann:

– Nei, tingmannalønin er góð. Eg gremji meg ikki um tað, og eg fari ikki at mæla til at broyta lønarviðurskiftini. Tó haldi eg, at vit tað sama kundu fingið løn frá fyrsta degi, ella tí degi, tá valbrøvini vórðu góðkent, men hatta er so ikki nakað, sum eg gangi og hugsi um.

Seinastu valstríðini hava víst, at fólk brúka nógvar pengar til valstríðið, sum seinnu árini er vorðið rættiliga persónligt. Men hvussu nógvar pengar hevur Johan Johannessen brúkt í valstríðinum.

– Mítt valstríð hevur kostað mær einar 20.000 krónur, so tað er ikki tað heilt stóra, sigur John Johannessen, sum um fáar dagar fær lønina fyri marsmánað. Tingmannalønin er 30.264 krónur og 73 oyru. Harafturat fáa allir tingmenn eitt skattafrítt ískoyti upp á 2.000 krónur um mánaðin. Teir tingmenn, ið búgva uttan fyri Havnina, fáa harumframt eitt ferðaendurgjald, sum er upp til 7.500 kr skattafrítt um mánaðin.

**Fakta**

### Løgtings- og landsstýrismannalønir

Løgtingslønin er 30.966,73 + eitt skattafrítt ískoyti upp á 2.000 krónur um mánaðin.

Landsstýrismannalønin er 41.966,40 kr um mánaðin. Landsstýrismenn fáa harumframt eisini 2.000 kr í skattafríum ískoyti um mánaðin.

# Vallógin og umsiting av Smyrli

**Á tingfundinum í dag verður fyrsta viðgerð av uppskoti Tjóðveldisfloksins um at flyta umsitingina av nýggja Smyrli til Suðuroyar**

TINGFUNDUR
*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*

Tingfundur verður í dag kl 13:30. Á skránni eru munnligir fyrispurningar, atkvøðugreiðsla um fyrispurning til Jógvan við Keldu um vallógina, sum Kári P. Højgaard hevur sett fram.

Løgtingið fer eisini at hava 1. viðgerð av uppskoti til broytingar í løgtingslóg um fólka- og farmaflutning. Talan er um uppskot frá Tjóðveldisflokkinum um, at øll umsiting av nýggja suðuroyarskipinum, íroknað rakstur og planlegging, verður løgd í Suðuroynni, tá ið skipið kemur í sigling.

Løgtingið fer á fundinum í dag eisini at velja nevningagrundlistanevndir, og síðsta punkt á skránni er sum altíð framløga.

# Johan Dahl fær onga løn

**Frákoyrdi landsstýrismaðurin fær hvørki ting- ella landsstýrismannaløn hesar tríggjar vikurnar, honum untist í Fiskimálaráðnum**

LANDSSTÝRISLØN
*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*

Á sama hátt sum løgtingsmenn, so verða landsstýrismenn ikki løntir fyrr enn tann fyrsta í mánaðinum eftir, at teir eru tilnevndir. Tískil verður fyrsta lønin hjá Jóannes Eidesgaard og hansara landsstýrismonnum lønin fyri marsmánað, sum verður útgoldin seinast í hesum mánaðinum.

Men av tí, at Johan Dahl ikki telist millum landsstýrismenninar longur, nú 1. mars nærkast, so fær hann als onga løn. Hann hevur verið landsstýrismaður í 20 dagar, og tað fær hann onga løn fyri.

Landsstýrismaður kann ikki hava onnur størv, tí má tingmaður, tá hann verður tilnevndur landsstýrismaður, sigur tingsessin frá sær. Tað gjørdi Johan Dahl, eins og allir hinir, og tí fær hann heldur onga tingmannaløn hesar tríggjar vikurnar.

Hóast Johan Dahl hevur verið mest umrøddi politikkarin í Føroyum seinastu vikurnar, so fær hann hvørki løn úr løgtinginum ella landsstýrinum fyri tað, so februarmánaður hevur hvørki politiskt ella fíggjarliga hepnast Johan Dahl væl.

Men nú hann ikki er landsstýrismaður meira, so fær hann bíðipengar í tríggjar mánaðir – tríggjar mánaðarlønir sum landsstýrismaður. Landsstýrismannalønin er 41.966 krónur umframt eitt skattaafrítt ískoyti upp á 2.000 krónur um mánaðin.

Nýggi landsstýrismaður, Bjørn Kalsø, sum verður tilnevndur í dag, fær hinvegin longu løn hesa vikuna – lønina fyri mars mánað.



*Johan Dahl fær onga løn fyri tær tríggjar vikurnar, honum untist í Fiskimálaráðnum*

# Fáa tvífalda løn

**Seks løgtingsfólk fáa dupulta løn næstu mánaðirnar**

POLITIKARALØN
*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*

Tey seks løgtingsfólkini, sum vóru í fráfarna landsstýri, fáa umframt tingmannalønina eisini bíðipengar úr landsstýrinum. Øll, uttan Annita á Fríðriksmørk, sum bara sat í landsstýrnum í tríggjar mánaðir, fáa landsstýrismannalønina í seks mánaðir. Annita fær bíðipengar í tríggjar mánaðir.

Tá Høgni Hoydal harumframt tekur sæti á fólkatingi í næsta mánaðir, fær hann umframt góðar 30.000 úr løgtinginum + sløkur 42.000 úr landsstýrinum eisini 44.000 krónur í fólkatingsløn, tilsamans 116.000 krónur um mánaðin.

Høgni Hoydal segði tó við Sosialin í farnu viku, at fólkatingsmaðurin hjá Tjóðveldisflokkinum letur part av lønini til ein floksgrunn, soleiðis at fólkatingsmaðurin ikki fær meira í sín part enn ein tingmaður.